# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali



**Partur 13**

Kári Handilsmaður hevur eisini hoyrt, at allar gávurnar eru stolnar og hevur tí latið handilin uppaftur. Hann er ikki vanur at hava opið jólaaftan, men hann sær ein góðan møguleika at tjena meira pengar, enn hann nakrantíð fyrr hevur gjørt. Men tað er eingin kø hjá Kára Handilsmanni. Fólkini í Hvannadali eru í so mikið ringum lag, at eingin hevur hug at keypa nakra gávu.

Inn hjá Leikamafiuni liggja Stampi og Anthonio í fasta svøvni. Men undir jólagávunum er jólamaðurin farin at flyta seg. Hann hevur latið eyguni upp, men av tí hann liggur undir øllum jólapakkunum, so veit hann ikki, hvar hann er. Enn er hann ov ússaligur til at reisa seg, so hann liggur bara og roynir at savna megi. Hann roynir at finna út av, hvat er hent. Tað síðsta hann minnist var, at hann fór gjøgnum kavan og niður gjøgnum eina húsatekju.

- Eg má verða endaður í einum seyðahúsi og havi fingið allar jólapakkarnar, sum vóru í posanum oman yvir meg.

Jólamaðurin er sjálvandi sera keddur um, at hann ikki megnaði at tendra jólatræið, men um hann nú liggur og hvílir seg eina løtu, so fer hann nokk at megna at bera gávurnar út. Jólamaðurin veit ikki, at inni í sama skúri, undir onkrum øðrum pakkum, liggja Stampi og Anthonio og sova.

Á politistøðini situr Jógvan við telduna og skrivar eina frágreiðing, og Erling situr uttan fyri geglið og heldur vakt. Erling arbeiddi nógv og leingi í gjár - hann hevur ikki sovið so væl í nátt, og tí er hann illa fyri og linur. Hann geispar ófført, og áðrenn nakar veit av, so sovnar hann. Trølla Omman og Trølla Pætur tosa ófført saman um, hvussu og hví tey eru endað her.

- Eg sum havi glett meg til jólaaftan, sigur Trølla Pætur við gráturødd.

- Og góði Trølla Pætur, um løgreglan ikki kann finna út av, hvør tað er sum hevur stolið allar gávurnar í bygdini, so mugu vit gera tað. Sært tú at Erling svevur.

- Ja, men vit sleppa ikki út fyri tað. Hurðin er stongd.

- Tað er einki problem, sigur Trølla Omman, meðan hon fer heilt fram til rimarnar.

- Sært tú lyklarnar, sum hann hevur hangandi í búksureimini.

- Ja, tað síggi eg omma.

- Vit skulu hava fatur á teimum. Hon koyrir stavin millum rimarnar og varisliga »fiskar« hon lyklarnar úr reimini hjá Erling. Erling veit ikki av, fyrr enn omman hevur fingið fatur á lyklunum og hevur latið hurðina til geglið upp. Trøllini ganga á tá framvið Erlingi og niður gjøgnum trappurnar. Men fyri at sleppa út úr geglinum, mugu tey framvið skrivstovuni hjá Jógvani. Tey lúra inn á skrivstovuna, men Jógvan er so mikið nógv upptikin við at skriva frágreiðingina, at hann ikki leggur tað til merkis, tá tey fara fram við hurðini hjá sær.

*Puntur 19 til jólakalendaran*



